Heri Joensen, gittarspælari í Týr:

# Flutt brúdleypið fyri konsert



*Heri Joensen, gittarspælari í Týr, (uttast til høgru) og unnusta hansara, Sigrid Dalsgaard, vórðu noydd at flyta brúdleyp teirra ein dag fram, av tí, at Týr skal spæla til konsert tann dagin brúdleypið upprunaliga skuldi vera*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Í dag, 2. august, skal gittarspælarin í Týr, Heri Joensen, giftast við unnustu sínari, Sigrid Dalsgaard. Upprunaliga skuldi brúdleypið vera tann 3. august, men av tí, at Týr skal spæla konsert við Runrig í morgin, vórðu Heri og Sigrid noydd at framskunda brúdleyp teirra ein dag**

LISTASTEVNAN 2002
*Ingrid Bjarnastein*

– Vit halda, at Týr stendur fyri nøkrum serføroyskum, sigur Birgir Kruse, stýrisformaður fyri Listastevnuna 2002.

– Tí hildu vit tað verða ógvuliga týdningarmikið at fáa teir at spæla saman við Runrig. Teir spæla serføroyskan tónleik, sum er latin í ein nútíðar rock-ham. Fyri útlendingar er Týr helst bara eitt av fleiri 100 rockbólkum, men fyri føroyingar og fólk, sum kenna tey føroysku kvæðini, er Týr nakað heilt serligt.

Hetta er grundin til, at valið fall heilt náturliga á Týr, vil Birgir Kruse vera við.

Hann vísir á, at bólkarnir eru ikki líkir tónleikaliga. Týr eru meira "heavy", meðan Runrig eru meira lyriskir, men teir eru eisini staðbundnir at plássinum teir koma frá, og eisini teir hava latið teirra tónleik í ein nútíðar ham.

### Stór samsýning

Avtalan við Týr var gjørd longu í august mánaða í fjør um, at teir skuldu spæla til Listastevnuna, men tá funnið varð útav, at Heri Joensen, gittarspælarin, skuldi giftast júst henda dagin, fingu fyrireikararnir jú ein trupulleika.

– Vit tingaðust aftur og fram um tað, og vit komu so fram til eina avtalu, sum allir partar eru nøgdir við, sigur Birgir Kruse.

– Nú vísir tað seg so, at brúðarhús skal vera tann dagin konsertin er, men bólkurin fær eina stóra samsýning afturfyri at spæla.

Stýrisformaðurin vil ikki út við nøkrum talið, men hann sigur so mikið sum tað, at samsýningin er rundhandað, og at hon er tann størsta, ið nakrantíð er givin einum føroyskum rockorkestri fyri at spæla í Føroyum.

– Í fjør var tað soleiðis, at Clickhaze spældi sum vinnarar av Prix Føroyum, og hetta er fast, men Prix Føroyar er jú bara annað hvørt ár. Men vit hava roynt at skipa tað soleiðis, at teir útlendsku artistarnir ikki renna avstað við øllum teimum størstu samsýningunum og teir føroysku bólkarnir soleiðis eisini fáa ein b ita av køkuni, greiðir Birgir Kruse frá.

### Strævið

Heri Joensen, brúðgómurin, sigur, at tað var eitt sindur strævið at skula flyta brúdleypið.

– Men tað var ikki gjørligt at flyta konsertina, so vit vórðu noydd at framskunda brúdleypið, sigur Heri Joensen.

– Vit vórðu longu bidnir um at spæla í august mánaða í fjør, men tá vit so spurdu nær Listastevnan skuldi vera, fingu vit at vita, at hon lá frá 10. – 18. august, og tí løgdu vit brúdleypið tann 3., sum so átti at verið eina viku áðrenn. Men av tí at Listastevnan so varð longd, so fullu dagarnir saman. Og tá var onki annað at gera enn at flyta brúdleypið.

Sjálvsagt spurdi Heri sína komandi brúður, Sigrid Dalsgaard, um hetta var í lagi áðrenn sagt varð ja til at spæla tann 3. august.

Brúðarhús skal vera sama dagin sum konsertin, men til tað sigur Heri bara:

– Jamen, so noyðist eg bara at vera vekk eina løtu.

Týr kemur á pallin klokkan 21.00 og skal spæla í ein góðan tíma áðrenn skotsku Runrig sleppa framat.

# Málið ikki úti av verðini

RÆTTING
*Eyðun Klakstein*

Í blaðnum í gjár varð formaðurin í Tjóðveldisflokkinum endurgivin fyri at siga, at málið um skuldsetingarnar hjá Tórbirni Jacobsen var úti av verðini.

Men soleiðis er ikki.

Høgni Hoydal heldur, at málið var eitt persónsmál, men varð gjørt til eitt samgongumál, og tað var púra burturvið. Men tann parturin av málinum, sum kundi føra til samgonguslit, varð loystur ólavsøkudag, tá Tórbjørn Jacobsen tók skuldsetingarnar aftur.

Men harvið er málið ikki endaliga úti av verðini, tí tað reisur nógvar spurningar og fer at verða viðgjørt í politisku skipanini, bæði millum samgonguflokkar og í flokkunum framyvir.

# List úr eystri

FRAMSÝNING
*Ingrid Bjarnastein*

Í sambandi við Listastevnuna 2002 letur upp ein forvitnislig framsýning av hjúnunum Djamal Djumabaeva úr Kirgisia og Mikahail Kudinov úr Ukreina. Tey eru búsitandi í Santa Pætursborg, har tey hava fingið listarliga útbúgving. Umframt at sýna fram í Russlandi, sýna tey eisini fram listarverk teirra fram í Italia, Spania, Týsklandi og Danmark. Á Listastevnuni leggja tey Føroyar afturat, og her verður høvi at njóta poetisku myndir teirra.

Framsýningin letur upp sunnudagin, 4. august, klokkan 16 í Listaskálanum.



# Bill eigur pengar úr yvir 300 londum

**William McLeod, sum býr í Klaksvík, hevur samlað upp á pengar síðani einaferð í 1967, so tá ið hann fær ein pengaseðla í hondina, so er tað ikki bert ein pengaseðil. Hann sigur, at hann byrjaði, tá hann á sínum ungu døgum fór út at sigla og harvið fekk møguleika at vitja mong ymisk lond**

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*



*Bill McLeod er her avmyndaður við tveimum av hansara mongu mappum við myntum og pengaseðlum í*

**Klaksvík:** Tað fyrsta Bill sigur, tá Sosialurin kemur á gátt er: »Nevn mær eitt land, sum eg ikki eigi pening frá!«

Og tá eg so nevni okkurt land, so hálar hann eina av teimum mongu mappunum, sum hann hevur, fram og finnur eftir lítlari løtu pengar úr hesum landi.

Inni í hansara ítrivsrúmi, sum er fult av mappum við pengum úr londum bæði nær og fjar, eru eisini mappur við frímerkjum, sum hann hevur savnað yvir eitt langt áramál. Men í dag samlar hann ikki longur upp á frímerkir.

Uppi undir loftinum í ítrivsrúminum hanga eisini eitt ótal av pennum og lykláringum, so tá ein traðkar inn í eitt tílíkt rúm, so er onki at ivast í, at her húsast ein samlari.

Hann hevur eitt ótal av mappum standandi á hillunum bæði við pengaseðlum og myntum. Og óansæð hvar tú hyggur inni í hesum tronga rúminum, so eru mappur ella bøkur, har eitt ella annað við pengum ella frímerkjum stendur á. Har eru pengar frá alskyns londum. Og Bill gevur sær góðar stundir at vísa pengarnar fram, meðan hann greiðir frá.

Hann vísir eina mappu, har tað stendur Zaire á, og greiðir frá, at hann eigur pengar frá landinum bæði áðrenn og aftan á, at tað skifti navn til Kongo. Hann leggur í sama andadrátti aftur at, at tað er sera torført at fylgja við, tí lond kring heimin skifta nøvn, sum vit onnur skifta hosur.

Millum annað eigur hann pengaseðlar frá Kongo við mynd av forsetanum, sum ongantíð náddi at gerast forseti, tí hann varð myrdur áðrenn.

So tekur hann eina aðra mappu av hillunum. Á henni stendur Russland. Í henni standa pengaseðlar frá tíðini áðrenn USSR fall og inntil í dag. Og tað er sera áhugavert at síggja virði á pengunum. Tann størsti pengaseðilin ljóðar upp á 50.000.000.000 og Bill hyggur upp við smílinum heilt uppi í eygunum, meðan hann greiðir frá, hvussu nógv tað kostar at skaffa sær hesar seðlarnar.

Hann er limur í einum altjóða klubbi fyri pengasamlarar og í gjøgnum tann klubbin, hevur tað eydnast honum at fáa pengaseðlar úr mongum ymiskum londum. Har ígjøgnum fær hann eisini nógvar ymiskar príslistar upp á pengar og verður eisini allatíðina dagførdur, so hvørt sum nýggir pengaseðlar koma út alla staðni kring knøttin.

Í hesum ítrivsrúminum standa eisini bøkur um pengar. Í hesum bókum, sum eru eitt slag av leksikon yvir pengar, standa myndir av alskyns pengum. Har kann Bill so leita eftir ymiskum pengum, sum tað enn ikki hevur eydnast honum at fáa fatur á. Hann roynir at skaffa sær eitt sett úr hvørjum landi. Og at síggja til hjá einum, sum ikki hevur so nógv skil fyri hesum ítrivi, so sær ikki út til, at honum manglar nógv. Men sjálvur sigur hann, at tað kemur okkurt nýtt allatíðina, so tað ræður um at fylgja við.

### Føroyskir pengar

Bill eigur ikki so nógvar føroyskar pengar, men tó ikki onki. Hann heldur, at hann byrjaði ov seint at samla upp á føroyskar pengar.

Hann eigur tó teir gomlu fimmkrónuseðlarnar og tíggjukrónuseðlarnar, bæði teir reyðu og grønu. Og so eigur hann ein túsundkrónuseðil, sum Marita Petersen, sála, fyrrverandi løgmaður hevur skrivað undir. Eisini eigur hann nógvar gamlar, danskar myntir.

Í somu mappu, sum allar tær donsku myntirnar eru í, eru eisini nakrar aðrar danskar myntir, sum føroyingar lótu gera undir krígnum. Á øllum teimum myntunum stendur árstalið 1941.

Í lummanum undir hesum myntunum eru nakrir Kjølbro´s pengar. Tað vóru pengar, sum Kjølbro lat gera í sínari tíð, og sum ein bert kundi keypa frá honum við.

Og Bill eigur enntá ein føroyskan 50 krónuseðil, sum er vrakaður, tí tað er feilur í prentingini. Bill vil ikki avdúka, hvaðani hann hevur fingið henda sjáldsama pengaseðil, men hann goymir hann sum reyðargull saman við øllum hinum pengaseðlunum.

### Byrjaði í 60-unum

– Eg byrjaði so smátt at samla upp á pengar, tá eg fór at sigla, sigur hann.

Bill er føddur í Skotlandi, men kom fyrstu ferð til Føroyar við einum trolara, sum fjúrtan ára gamal. Tað var í 1946.

– Vit komu regluliga inn á Klaksvík, so rættiliga skjótt kom ein at kenna mong fólk her. Og so møtti eg Albertu og vit giftust í apríl í 1956. Og tá eg so fór út at sigla langvegis, byrjaði eg so av álvara at fáa áhuga fyri at samla, greiðir Bill frá.

Hann var fleiri ferðir bæði í Grønlandi og Íslandi og fiskaði, og tá hann so kom heim aftur, goymdi hann pengar frá londunum báðum. Og soleiðis byrjaði tað heila.

Hann fór so at sigla við Polarfarinum og áhugin fyri útlendskum pengum bara vaks og vaks.

At byrja við samlaði hann tó bert upp á myntir, men í dag er hann givin við tí, og samlar bert upp á seðlar.

Hann greiðir frá, at tað eru fleiri flokkar av pengum, júst sum við so mongum øðrum. Tað vil siga, at teir reinu og sløttu seðlarnir, sum ongin so at siga hevur nomið við, teir eru fyrsta floks, meðan seðlarnir so verða flokkaðir niður eftir alt eftir góðskuni á teimum.

– At samla pengar er eitt sera kostnaðarmikið ítriv, sigur Bill.

Hann greiðir frá, at serliga myntirnir kunnu vera sera dýrir. Tann dýrasta myntin, sum hann vísir mær á í eini bók, er frá einaferð í 19. øld og kostar upp móti 50.000 krónum fyri eina. Hon er eisini úr gulli. Eina tílíka mynt eigur Bill tó ikki, men hann eigur kortini eisini gullstykkir.

– Tá tað verður ov dýrt, so leiti eg eftir tí bíligasta, sum eg kann finna, sigur hann og smílist.

### Onga teldu

Fyri at kunna halda skil á eini slíkari ørgrynnu av pengum, so má tað vera skipað. Men Bill hevur onga teldu, men har aftur ímóti hevur hann eitt ringbind, har hann hevur skrivað hvønn tann einasta pengaseðil niður, sum hann eigur. Tað vil siga, at hann hevur skrivað úr hvørjum landi seðilin er úr og seriunummarið niður. Ringbindið stendur at bresta við ørkunum við hesum týdningarmiklu upplýsningunum í.

– So um nakar stjelur frá mær, so síggi eg beinanvegin, hvat tað er fyri ein seðil mær manglar. Og av tí, at eg havi seriunummarið, so kann hann skrásetast. Og so er bara hjá tjóvinum at nýta pengaseðilin ella at royna at sleppa sær av við hann, sigur Bill flennandi.

– Eg hugsaði eina ferð um at fáa mær eina teldu, men eg veit ikki... tað er ongantíð blivið til nakað, og nú eri eg so gamal, at nú verður tað helst ikki til nakað, sigur Bill.

Bill plagdi at samla upp á frímerkir fyrr eisini, men tað er hann givin við.

– Tíðin er farin frá brævskrivaðríið, heldur hann.

Men beint áðrenn eg takki fyri meg, vísir hann mær tvey sjálvsom frímerkir á einum brævbjálva úr USA.

Annað frímerki er av Marilyn Monroe og hitt av Elvis Presley.

So ikki kann annað sigast um henda samlara á Bøgøtu í Klaksvík enn, at hann eigur mangt og hvat spennandi og sera áhugavert inni í ítrivsrúminum hjá sær. Kona hansara, Alberta, sigur, at hann trívist eisini sera væl inni har, og at tað bert er áhugin hjá honum fyri at eiga útlendskar pengar, sum drívur verkið.

# Venjari til Ægir ikki settur enn

**Hóast hann ikki er endaliga settur enn, so vónar formaðurin í svimjifelagnum Ægir í Klaksvík, at felagið kann byrja venjingarnar aftur, tá skúlarnir byrja aftur**

SVIMJING
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Dan Mikkelsen sigur, at tey hava onkran, sum tey hava tosað við um at verða venjari hjá Ægi, men enn er ikki nakað endaligt avgjørt.

Hann sigur, at tey í Ægir fegin vilja byrja aftur, tá skúlarnir byrja. Og hóast felagið so at siga datt niður fyri, meðan umbyggingin av svimjihøllini stóð uppá, so heldur formaðurin, at tað sær bara heilt gott út hjá teimum viðvíkjandi fólki til komandi kappingarár.

Dan hevur tosað við onkran av teimum eldru svimjarunum, sum rættiliga byrjaðu at gera um seg, beint áðrenn svimjihøllin lat aftur, og siga fleiri av teimum seg verða spent upp á at fara at byrja venjingarnar aftur.

Hann vil tó ikki koma beinleiðis inn á nakað, men hann sigur, at tað sær ljóst út, sum er fyri felagið.

Millum svimjararnar, sum vóru við tá, kunnu nevnast Bára Joensen og Kristian Olsen. Bára vann heitið Ársins svimjari hjá kvinnum kappingarárið 2000/01 og Kristian var bert fáar atkvøður frá at vinna sama heiðurin hjá monnum. Dan vónar, at um tey bæði koma aftur, so kunna tey verða við til at toga nøkur av hinum við aftur.

Kristian Olsen sigur, at hann hevur ætlanir um at byrja at svimja aftur nú, meðan tað kanska enn er eitt sindur óvist um Bára fer at byrja aftur ella ikki.

### Góð svimjihøll

Dan Mikkelsen heldur, at svimjihøllin nú er fín.

– Gott nokk er bygningurin gamal enn, men hatta er sum ein nýggj høll, sigur Dan.

Hann dylir heldur ikki fyri, at tær nógv betraðu umstøðurnar í høllini bæði viðvíkjandi ljóði og ljósi fara at gera sítt til at kappingar, sum skulu verða í høllini, fara at eydnast betri.

Byggiætlanin fyri Klaksvíkar Svimjihøll er í trimum byggistigum og er fyrsta byggistig um at verða liðugt nú. Ætlanin at fara undir annað byggistig um eini fýra til fimm ár. Summi halda, at tað kann fara at vera torført at byggja eitt svimjifelag upp undir tílíkum umstøðum, tí svimjararnir mugu hava eitt stað at venja í.

Tað var tað, sum gjørdi, at felagið datt niður fyri, meðan fyrsta byggistig stóð upp á, tí svimjararnir høvdu ikki umstøður til at ferðast í millum hvønn dag til venjing.

Men Dan heldur, at tað kanska ikki verður ein aktuellur trupulleiki um fýra til fimm ár, tí tað ljóðar sum um tað møguliga verður koyrandi um Leirvíksfjørð til ta tíð, og tað ger alt munandi léttari.